## VIÐMERKINGAR

so fitti fyrrverandi læraravikarur í Skálavík, sum nýliga hevur gjørt vart við seg í sambandi við samansetingina av vísindaligu siðseminevndini, at hann í protest móti ekstremu høgrakreftunum er lopin av vegnum og yvir í vinstru gryvjuna, við at melda seg inn í bólkin hjá Brynhild. Men møguliga ger ein honum órætt, tí fleiri aðrir føroyingar eita Eyðun og fleiri hava eftirnavnið Andreassen. Tá ið ein vil almannakunngera navn sítt, so mátti tað minsta verið, at sett starv og bústað undir, og ikki kamuflerað seg við, at fleiri eita tað sama sum ein sjálvur.

### Sekularisering

Kravið hjá teimum mentaðu, sum manna bólkin hjá Brynhild Thomsen, er, at føroyska samfelagið ikki longur skal byggja á tey kristnu lívsvirðini, men vera sekulariserað, tað merkir, at vit skulu burturav gera Føroyar til eitt verðsligt samfelag. Ja, soleiðis stendur svart uppá hvítt í áheitanini frá bólkinum. Somu fólk tosa í dag um minnilutadiktatur.

Men her er sanniliga talan um minnilutadiktatur, so tað stendur eftir, tá ið ein bólkur, sum ikki telur so frægt sum 1% av Føroya fólki, skal trumfa síni sjónarmið ígjøgnum at galda allar føroyingar, og, sum gevur løgtinginum harraboð, at tað skal uppfylla teirra krøv og eingi onnur.

### Happing

At allir føroyingar, undantikið trýhundraðmannabólkurin hjá Brynhild Thomsen, happar tey samkyndu, er ikki smávegis skuldseting. Jú, tá ið ikki hjálpir við góðum, so verður gripið til tey skitnu vápnini, ósannindi og illgitingar.

Tosi við mong menniskju millum ár og dag, eisini um hetta málið, og tað ikki bara fólk, sum koma í kirkju ella eru virkin í politikki, men vanlig menniskju á gøtuni. Hóast tey ikki síggja nakra meining við, at lóggeva fyri at samkynd ganga saman í paralag og hjúnalag, havi eg aldri hoyrt nakran teirra happað ella vanvirt tey á nakran hátt.

Persónliga eri eg eisini bara eitt vanligt kirkjufólk og ikki limur í nøkrum politiskum flokki, og teir mongu víttgangandi átrúnabólkarnir í Føroyum, eru líka fjart frá mær, sum bólkurin hjá Brynhild Thomsen.

Hvat viðvíkur happing frá einstøkum menniskjum, verður trupult at verja seg fyri. Tað hava altíð verið einstaklingar, ið hava happað. Børn vera happað í skúlanum, brekað vera happað, tey, ið eru øðrvísi enn fjøldin, vera happað, menn umborð á skipi hava verið happaðir av einstaklingum, men fyri tað kann hetta ikki sigast at vera generelt.

At gera tað til happing, at fjøldin av landsins íbúgvum ikki góðtekur allar lógir, sum einstaklingar krevja at fáa settar í verk, er við síðuna av. Ivaleyst finnast einstakir føroyingar, sum vildu havt deyðarevsing setta aftur í gyldið í Føroyum. Skullu so hesir fáa teirra krav ígjøgnum móti fjøldini av fólkinum, sum ikki vil tað?

### Ikki øll samkynd líka

Samkynd eru ymisk sum øll onnur. Tað eru samkynd, sum eru agressiv, ágangandi og frek, og sum sópa allar aðrar meiningar til viks. Tey vilja einki hava við kirkjuna gera, men spotta alt, sum er andaligt og kristiligt. Kortini skulu tey inn í kirkjurnar at verða vælsignað sum hjún.

Men tað eru eisini samkynd, sum veruliga hava tað trupult.

Ikki eru tað hesi, sum seta krøvini, sum bólkurin hjá Brynhild Thomsen kemur við. Tey vita, at teirra kynslív er avlagað. Fleiri teirra koma eisini í kirkjuligt umhvørvi, og høvdu ikki funnið uppá at sett kirkjuni krøv, at hon skal gera teirra kynslív normalt. Tey vita, at tey ikki eru skapt soleiðis, men at ymisk viðurskifti, eitt nú umhvørvið, tey hava livað í sum børn og í uppvøkstrinum, hevur avskeplað teirra sexuallív.

Tey eru vorðin misbrúkt av foreldrum, familjulimum o.ø. Hesi menniskjuni hava tørv á kærleika, umsorgan og fatan, og tað er skylda okkara, at vera góð við tey, og ikki bagatellisera teirra trupuleika.

Heldur ikki eru tað hesi, sum royna at skapa óneyðugt stríð um hetta mál. Tey, sum skapa stríðið og øsa upp fólkið, eru har afturímóti bólkar, sum tann hjá Brynhild Thomsen.

Um mentannarbólkurin hjá Brynhild Thomsen saman við Útvarpi Føroya skal avgera, hvussu føroyska samfelagið skal myndast í framtíðini, eru útlitini døpur. Men vónandi dugir vanligi føroyingurin at sálda meginpartin frá og siga nei takk til tað, sum hesi borðreiða við og vilja tvinga niður í okkum.

Heitt skal vera á Brynhild Thomsen og bólk hennara: Latið vera við at brúka tey samkyndu sum amboð í tykkara leiki, at sekularisera samfelagið, og harvið leggja tyngri byrðar á herðar teirra, enn tær, tey longu knógva undir.

# Á landsfund hjá Labour Party



**Javnaðarflokkurin**
*Tíðindaskriv*

Hósdagin 26. sept. fer formaður Javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður á vitjan í Skotlandi og Onglandi. Vitjanin er komin í lag eftir innbjóðing frá Labour Party, sum heldur landsfund í komandi døgum í Blackpool.

Hóskvøldið verður Jóannes gestur hjá Anne Begg, MP fyri Aberdeen South til ársveitsluna hjá skotska Javnaðarflokkinum.

Fríggjamorgunin, tá Peterhead Fish Market letur upp, verður Jóannes gestur hjá stjóranum á Peterhead Harbours. Peterhead Fish Market er størsti fiskimarknaður í Norður Evropu. Tað verður sagt, at Peterhead Fish Market ávirkar vanligu fískaprísleguna, sum so aftur merkir, at tey, sum selja og keypa fisk aðrastaðni, skeita til marknaðin í Peterhead fyri at vita, hvussu prísurin er. Sostatt kann sigast, at fiskamarknaðurin í Peterhead hevur stóran týdning fyri keyp og sølu av fiski í allari Evropu.

Seinnapartin fríggjadagin verður vitjað á Robert Gordon Universitetinum í Aberdeen. Robert Gordon Universitetið er sera áhugavert, tí seinasta ár fingu 98% av teimum lesandi arbeiði ella vóru farin at lesa víðari. Hetta er besta úrslit, eitt bretskt universitet kann vísa á. Robert Gordon hevur eisini fleiri føroyskar studentar umframt teir, sum eru fjarlesandi. Leiðslan á Robert Gordon ger nógv burtur úr, at næmingarnir skulu hava eitt tilknýti til starvspláss, og tí eru avtalur gjørdar við bæði virkir og stovnar um at fáa tey lesandi at arbeiða har í styttri og longri tíðarskeið í samband við sjálvan lesturin. Hetta tryggjar, at samsvar ert ímillum lesnaðin á universitetinum og starvsmøguleikar eftir loknan lestur.

Sunnudagin verður landsstevnan hjá Labour sett í Blackpool í Onglandi. Væntandi heldur Tony Blair røðu týsdagin, og millum forvitnisligu gestarøðarnar hesuferð verður fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton.

Væntandi verður kreppan við Irak eitt av høvuðsevnunum í røðuni hjá forsætisráðharranum, og tað er mangt, sum bendir á, at hann kann rokna við at fáa nógvar atfinningar.

Millum aðrar røðarar er eisini Patriciu Hewitt. Hon er ráðharri við vinnumálum og hon fer at greiða frá, hvussu týdningarmikið tað er, at kvinnur og menn býta maktina ímillum sín fyri at fáa samfelagið at virka betur. David Blunkett, sum er ráðharri við innanríkismálum fer at svara spurningum um gøtukriminalitet, integratión av flóttafólki og innflytarum, útbreiðslu av hashi og øðrum evnum.

Á ráðstevnuni verða eisini sokallaðar workshops, har ráðharrar og onnur hava eitt upplegg, sum luttakararnir síðani kjakast um. Workshop er nógv brúktur hóttur til tess at fáa viðgjørt mál

Sum vanligt er til slíkar fundir, verður ein røð av mótmælisgongum framman fyri hølunum, har landsfundurin heldur til. Í løtuni er tað revaveiðan, sum er aktuel, men møguleikn fyri mótmælisgongu ímóti hvalaveiðu, er ikki óhugsandi.

# Dagspressa & fjølmiðlar falska propaganda!

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Eg havi nógv at stríðast fyri og ímóti øllum etableraðum bløðum, útvarpum, sjónvarp, ið kunnu dragast til svars fyri at skapa falska propaganda mótvegis brúkarum!

Tað er tá ið hesi tæna Multinationalum oljufyritøkum & heilivágsfyritøkum, ið skaða føroyskan búskap og samfelag við at villleiða vanligar brúkarar kring landið! Tað síggja og hoyra vit fleiri ferðir um vikuna, tá ið fólkið á bløðum, útvarpum, sjónvarpi lata seg prostituerað mótvegis áðurnevndu fyritøkum hesi seinastu árini!

Tað er eitt ólukksáligt svínarí, at diskriminera tey skrivandi og talandi, ið uppihalda bløðum, útvarpum og sjónvarpi í mun til áðurnevndu fyritøkur, ið fáa ókeypis PR í dag!

Tað eru øll hesi og fólk innan almenna, privata, land, kommunu, ríkið, ið í felag skapa falska propaganda mótvegis vanligum brúkarum kring landið og í Havnini í dag!

Tað er tá ið ein vísir til, hvussu avskeplað og kappingaravlagað øll búskapar-, samfelags-, handils- og vinnulig viðurskifti eru kring landið í dag!

Tað er tá ið ein vísir til, hvussu grundleggjandi skeivt og órættvíst alt er skipað við atliti til áðurnevndu viðurskifti, ein ger vart við í lesarabrøvum í bløðunum! Tað hevði verið til størri sóma, um blað-, útvarps- og sjónvarpsfólk tóku stig til at virka fyri at skapa neyðugu javnvágina í allan tíðindaflutning sum skjótast!

Tað vanligum brúkarum tørvar er at kunna fylgja við tí, ið røkist úti í tí dagliga, fjøltáttaða virksemi, ið uppiheldur øllum samfelags- og húsarhaldsvirksemi í dag!

Tí skuldu blað-, útvarps- og sjónvarpsfólk roynt at fingið sett seg inn í viðurskiftini hjá vanligum brúkarum, ið hava ilt við at sláa ígjøgnum falska propaganda. Tað hevði verið gott, um tit kundu broytt tykkara hugsjónir, atburð, hugburð og málburð sum skjótast!

P.S. Eg skal arbeiða ímóti slíkum fyritøkum!

# »Nakin um miðjuna«

**Pól H. J. Debes**
*Skopun*

Tað er »In« í dag at ganga nakin um miðjuna, so at nalvin sæst. Eg veit um tvey – ein mann og eina konu – ið ikki kundu »prála« av at hava nalva. Tey búðu í einum urtagarði eina tíð, men seinni virkaðu tey uttan fyri urtagarðin. Tað er langt síðani tey livdu og vóru í ætt við allar føroyingar. Hvørji tey vóru? Omma tín eigur at vita.




ítróttur

Nr. 185 • fríggjadagur • 27. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ungdómsarbeiðið í Vági blómar

**Í ár hevur VB vunnið bæði dreingja- og unglingadeildina, og t**

**FØROYAMEISTARAR**
*Jákup Mørk*

Hóast besta mansliðið hjá VB hevur verið í mest sum hálvtungum sjógvi alt kappingarárið, so er einki at ivast í, at tey í felagnum hava nógvar aðrar orsøkir til at fegnast í hesum døgum.

Seinastu vikuna hava bæði dreingja- og unglingaliðið í felagnum vunnið Føroyameistaraheitið, og sum vera man, so verður nógv gjørt burturúr. Eitt nú var skoti við fýrverki á bæði Drelnesi og í Vági, tá dreingjaliðið mikukvøldið kom heimaftur úr Havnini, har teir eftir dystin móti HB fingu handað steyp og heiðursmerki.

### Av serligum slag

Tað er í sjálvum sær merkisvert, at eitt felag sum VB skal taka sær av gullkrónunum í tveimum fylgjandi aldursbólkum, men í felagnum sjálvum eru tey ikki í iva um, hvør orsøkin til hetta er.

- Tað er miðvísa ungdómsarbeiðið, sum vit hava gjørt seinastu árini, sum eru orsøkin til hetta. Ikki bara eftir at vit fingu milliónina frá UEFA men eisini í árunum undan hesum, hevur felagið framt eitt miðvíst arbeiði, har vit hava havt útbúnar venjarar til øll liðini, og tað er gleiðiligt, at vit nú síggja somikið góð úrslit av hesum, sigur formaðurin í felagnum, John Henrik Holm.

Ikki minst er hann fegin um, at bæði liðini eru vorðin føroyameistarar, hóast nógvar umstøður hava tosað ímóti hesum.

- Unglingaliðið er mest sum meinlíkt dreingjaliðnum, sum í fjør gjørdist meistarar, og hava sostatt framvegis tvey ár eftir í unglingadeildini, so tað í sjálvum sær er ótrúliga flott.

- Dreingjaliðið er eisini mest sum nýtt, og í ár byrjaði liðið í økiskappingini. Tað vil siga, at tá farið varð undir endaspælið, vóru teir trý stig aftan fyri oddaliðið, men kortini hava teir megna at vunnið, og tað er ótrúliga flott av teimum, sigur ovurfegni formaðurin um liðini.

Og sjálvur tykist hann eisini hava ilt við at fata, at tað skal ganga somikið væl, sum tað hevur gjørt.

- Hyggur tú at fólkatalinum, so er tað flott, bara tað at vit kunnu manna eitt lið, og at vit so kortini skulu síggja so nógv talentir millum hesar leikararnar er mest sum ótrúligt. Tað vísur bara, at hesir dreingirnir eru gjørdir av heilt serligum slag. Teir eru snøgt sagt vinnaratypir, sum nokta at tapa.

### Mynda framtíðina

At enda er sjálvandi eisini nærlagt at spyrja formannin, hvørt hesir báðir árgangirnir ikki geva honum góðar vónir fyri framtíðina hjá felagnum, og hesum játtar hann sjálvandi.

- Tað er ikki bara hesir. Vit síggja í dag, at tað eru nakrir framúr góðir leikarar í mest sum hvørjum árgangi hjá okkum, og málið hjá okkum má eisini vera at ala so nógvar egnar leikarar, sum yvir høvur gjørligt. Vit hava sjálvandi havt nógvar útlendskar leikarar á besta liðnum seinnu árini, men málið má verða, at vit skulu hava so nógvar av okkara egnu sum gjørligt.

- Og tað ivist eg heldur ikki í, at vit fáa. Møguliga verða tað nakrir av teimum, sum nú eru meistarar, sum mynda liðið næsta ár, ella kanska verður tað árið eftir. Men at teir sláa ígjøgnum fyrr ella seinni eri eg ikki í iva um, sigur formaðurin at enda.



*Dreingjaliðið hjá VB var trý stig aftanfyri, tá endaspælið byrjaði, men kortini gjørdust eisini teir meistarar. Á liðnum í ár, sum varð vant av Predrag Zivkovic, leiktu: Bergur Poulsen, Arthur Tausen, Marner Ludvig, Poul Poulsen, Dan Poulsen, Bjartur í Lágabø, Heðin Poulsen, Jón Samuelsen, Poul N. Poulsen, Martin Poulsen, Fróði Thomsen, Andre Kjærbo, Niklas G. Joensen, Hartman Hansen og Lukasz Cieslewicz*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Unglingaliðið hjá VB, sum gjørdust meistarar, varð mannað við: Heini Jacobsen, Allan Kjærbo, Hálvdan Heinesen, Birni Kjærbech, Heini Larsen, Jákup Olsen, Jónar B. Dahl, Eyðstein í Lágabø, Jákup Sørensen, Andras Kjærbo, Kári í Lágabø, John Poulsen, Allan Smedemark, Jóan Pauli Thomasen, Símun Samuelsen, Jan Vestergaard, Hans Allan Niclasen, Eyðfinn Ludvig og Rasmus Nolsøe. Venjari hjá liðnum er Hans Nielsen*

*Mynd: www. vb1905.fo*

# Uttandura firmakapping

**Aftur í ár fer B36 at skipa fyri uttandura firmakapping, og verður hendan hildin Í Gundadali 12. oktober**

**Firmakapping**
*Jákup Mørk*

Eftir at flestu fótbóltsáhugaðir føroyingar nú í nakrar mánaðir hava staðið kring ymsu vallirnar í landinum – og helst gera tað tvey vikuskifti afturat – eru vit nú komin til tíðina, har tað eisini ber til hjá áskoðarum at gera vart við seg. Í øllum førum hjá teimum, sum hava onkrar fótbóltsglaðar starvsfelagar.

Nú komandi vikuskifti fer HB at hava sína firmakapping, sum er ein innandurakapping, og 12. oktober er tað so B36, sum skipar fyri, tá árliga uttandura-firmakappingin verður hildin.

Hetta er fjórða árið á rað, at B36 skipar fyri kappingini, og mett eftir undirtøkuni ber neyvan til at siga annað enn, at kappingin hevur fingið sera góða undirtøku.

Sum vant, tá talan er um firmakapping, so verða ávísar treytir settar fyri, hvussu sterk liðini hjá ymsu fyritøkunum kunnu vera. Hetta verður í ár gjørt soleiðis, at tað ikki er loyvt virkjum at nýta leikarar, sum hava tikið lut í lands- ella steypakapping hjá feløgunum í trimum teimum ovastu mansdeildunum.

Reglurnar eru annars so, at spælt verður við sjey leikarum á hvørjum liði, men í alt kunnu 12 leikarar vera á hvørjum liði, tá eykaleikararnir eru íroknaðir.

Meðan kappingin fer fram, er sjálvandi møguleiki hjá luttakarunum at sita inni í hølunum hjá B36 og fáa sær ábit av onkrum slag, soleiðis at bíðitíðin millum dystirnar ikki kennist alt ov long, og eftir at alt er avgjørt, verður handan av heiðursmerkjum og steypum, sum Skipasmiðjan Føroyar letur.